# Spyr í Fólkatinginum um støðuna hjá føroyingum

*Jóannes Eidesgaard vil hava at vita frá danska fíggjarmálaráðharranum um ein útrokning finst fyri, hvussu nógv føroyingar í Danmark, kosta í útbúgvingarstuðli, arbeiðsloysisstuðli o.s.fr. Men hann vil eisini hava av vita um eitt roknistykki finst fyri, hvussu nógv føroyingar, sum arbeiða í Danmark, forvinna til danska landskassan*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Finst eitt útrokning í danska fíggjarmálaráðnum sum fyri, hvussu nógv føroyingar kosta danska landskassanum, bæði teir føroyingar, sum búgva í Føroyum, og teir føroyingar, sum búgva í Danmark?

Hetta er ein spurningur, sum annar tann føroyski fólkatingsmaðurin, Jóannes Eidesgaard, nú vil hava greiði á.

Men hann vil eisini hava at vita, um tað ber til at rokna út, hvussu nógv ið føroyingar, sum arbeiða í Danmark, forvinna til donsku bruttotjóðarúrtøkuna.

– Og hví er hetta roknistykki ikki uppi í tí fyrra?

Fyri at fáa greiði á hesum spurningum, hevur Jóannes Eidesgaard reist málið í fólkatinginum, har hann hevur sett danska fíggjarmálaráðharranum, Mogens Lykketoft, ein skrivligan fyrispurning um hetta evni.

Somuleiðis vil hann hava at vita, hvat endamálið við hesum útrokningum er.

Jóannes Eidesgaard sigur, at orsøkin til, at hann spyr, er, at tað er komið fram í føroyska útvarpinum, at tilsamans kosta føroyingar danska landskassanum 1,9 milliard.

– Umframt ríkisstuðulin er játtanin til danskar stovnar í Føroyum talt uppí, umframt útreiðslurnar til læraraeftirlønir, krígspensjónir og aðrar pensjónir upp á 118,6 milliónir.

Men Jóannes Eidesgaard sigur, at tað mest merkisverda er, at tað er eisini tikið upp í, hvat føroyingar, sum búgva í Danmark, kosta í útbúgvingarstuðli, barnaansing, arbeiðsloysisstuðli, sjúkrapeningi, barnapeningi og ørðum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hesar útreiðslur eru roknaðar út til at vera 488 milliónir.

Meiri enn helmingurin av hesum verður sagt at fara til fólk við ongum arbeiði.

Fólkatingsmaðurin sigur, at, hesar útrokningarnar eru gjørdar eftir teimum útreiðslum, sum danski staturin hevur av útlendingum í Danmark.

–Tað er vanliga fatanin í Føroyum, at talið av arbeiðsleysum føroyingum í Danmark er ikki yvir miðal.

– At útreiðslurnar til føroyingar í Danmark tí verða bólkaðar undir útreiðslurnar til útlendingar í Danmark, er tí næstan provokerandi, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann spyr tí eisini Mogens Lykketoft, hví ongin útrokning er, sum vísir, hvussu nógv føroyingar í Danmark, forvinna til danska samfelagið.

– Hvat við teimum føroyingum, sum eru í vinnu í Danmark? Hvat við teimum, sum gera íløgur í fiskivinnuna á sjógvi og landi og sum útvega hundraðtals fólkum arbeiði? Og, hvat við øllum teimum føroyingum, sum eru yvirmenn í danska handilsflotanum, og sum tískil fáa eina av størstu útflutningsvinnum í Danmark at virka?

### Ein seymur í kistuna

Jóannes Eidesgaard sigur, at hvørja ferð ríkisfelagsskapurin verður mettur í krónum og oyrum, verður enn ein seymur settur í líkkistuna hjá ríkissfelagsskapinum.

– Hjá teimum, sum hava álit á ríkisfelagsskapinum, kann tað verða trupult at síggja endamálið í eini útrokning, sum er so einvegis, sum hendan er, táið tað hevði verið rættari at tikið inntøkurnar við eisini, sigur Jóannes Eidesgaard.




*– Hvørja ferð, vit seta krónur og oyru á ríkisfelagsskapin, seta vit ein seym í líkkistuna hjá ríkisfelagsskapinum, sigur Jóannes Eidesgaard, fólkatingsmaður, sum her er avmyndaður á skrivstovu síni á Christiansborg*

# Útbúgving fær nú heimild

*Síðani 1995 hevur Fiskivinnuskúlin staðið fyri eini 3-ára yrkisgymnasialari útbúgving við støðisári uttan heimild í lógini og uttan nakra kunngerð fyri útbúgvingini, men nú hevur Signar á Brúnni lagt uppskot fram um hetta*

ÓLAVUR Í BEITI

Undirvísingarmálaráðharrin Signar á Brúnni hevur nú lagt uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Yrkisskúla fyri fiskiídnað og havbúnað, og kemur nú aftrat lógini at standa broytingin um eina yrkisgymnasiala útbúgving innan fiskivinnu og havbúnað.

Í viðmerkingunum, sigur Signar á Brúnni, at formliga grundarlagið hjá Fiskivinnuskúlanum er løgtingslóg frá 5. mai 1987 um Føroya Yrkisskúla fyri fiskiídnað og havbúnað. Lógin umrøður eina útbúgving og lærugreinar, ið ikki svara til tað virksemi, ið fer fram á skúlanum í dag.

### Elvt til trupulleikar

– Síðani 1995 hevur skúlin staðið fyri eini 3-ára yrkisgymnasialari útbúgving við støðisári uttan heimild í lógini og uttan nakra kunngerð fyri útbúgvingini. Hetta hevur sjálvsagt elvt til nógvar trupulleikar, bæði fyri fyrisiting og skúla. Misnøgdin um hesi viðurskifti er ofta komin til sjóndar.

– Skal útbúgvingin umsitast á nøktandi hátt, er alneyðugt, at formliga grundarlagið er til staðar. Í seinastuni hevur Undirvísingar- og Mentamálastýrið tí, í samráði við skúlastjóran, tilevnað eina kunngerð fyri útbúgvingini. Henda kann tó ikki setast í gildi, fyrr enn lógin gevur heimild fyri tí, sigur Signar á Brúnni í viðmerkingunum.

## GJALDOYRAMARKNAÐURIN

### Enska pundið viknað

Sum væntað, hækkaði enski tjóðbankin ikki rentuna seinasta hósdag. Seinni í dag verður enska fíggjarætlanin fyri 2001 almannakunngjørd. Væntandi vísur hon eitt avlop uppá 8 mia. ensk pund. Hetta gevur ensku stjórnini møguleika at lække skattin ella økja um útreiðslurnar.

Ein tílík broyting fer at ávirka búskaparligu gongdina í framtíðini. Eru tílík tiltøk við í fíggjarætlanini, fara hesi at geva ábendingar um, hvussu enska rentan verður í framtíðini. Møgulig tiltøk frá stjórnini fáa helst ikki ávirkan fyrr enn næsta ár, og tí verður ávirkanin á pundið í dag neyvan stórvegis.

Útlit til enn eina amerikanska rentuhækking hava havt við sær, at enska pundið nú er tað lægsta mótvegis amerikanska dollarinum í nærum 8 mánaðir. Um amerikanska rentan verður hækkað, verður hon 6 %, sum er tað hægsta í 5 ár. Hetta er tað sama sum enska rentan. Enska pundið kundi í dag á middegi keypast fyri 1201,34 móti 1215,38 fyri viku síðani.

## VIRÐISBRÆVAMARKNAÐURIN

### Danski tjóðbankin hevur hækkað rentuna

Sum væntað, hækkaðu bæði evropeiski og danski tjóðbankin leiðandi rentuna í síðstu viku. Orsøkin var vandin fyri hækkandi inflatión. Av tí at roknað varð við rentuhækkingini, var lítil broyting í teimum stuttu lánsbrøvunum, men marknaðurin tyktisr bjartskygdari.

Næstu mánaðirnar kann roknast við, at tær stuttu renturnar í evropa framhaldandi fara at hækka, tí evropeiski tjóðbankin ynskir at verða uppá forkant við inflatiónini, og fer marknaðurin soleiðis at innrokna rentuhækkingar í tær stuttu rentutnar.

Inflatiónstølini í Evropa fyri februar komu mánadagin, og vístu tey, at inflatiónin hækkar 2% ár/ár, og er tað júst markið hjá evropeiska tjóðbankanum.

Oljuprísurin er eisini fallin nakað seinastu vikuna, av tí at marknaðurin væntar, at tað fer at eydnast OPEC-londunum at semjast um at hækka framleiðsluna á fundinum 27. mars.

Soleiðis vænta vit ikki, at evropeiski og danski tjóðbankin hækka rentuna aftur fyrr enn í mai mánaði.

Amerikanski tjóðbankin hevur rentufund í dag, og roknar marknaðurin við eini rentuhækking á 0,25%. Vit rokna ikki við stórum broytingum á lánsbrøv. Heldur kunnu vit rokna við broytingum á partabrævamarknaðinum.

Higartil í ár eru tey vanligu partabrøvini úr framleiðsluídnaðinum fallin, meðan tey sokallaðu KT-partabrøvini eru hækkaði.

Gongdin hesa seinastu vikuna á danska lánsbrævamarknaðinum hevur havt við sær, at 10-ára danska statslánsbrævið - 6% st. lån 2009 - kl. 11 í morgun kostaði 103,27 móti 102,67 fyri viku síðan. 2-ára statslánsbrævið - 4% Stgb 2001 - kostaði 99,43 móti 99,38 fyri viku síðan. Tað føroyska lánsbrævið - 4,125% FRL 2000 - kostaði 99,60, sum svarar til eina effektiva rentu á 4,68%.






*Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri og Anfinn Kallsberg á tíðindafundi í forsætismálaráðnum fríggjakvøldið* **Mynd: Jens Kristian Vang**

# Sáttmálauppskot landsstýrisins

Á tíðndafundi í Tinganesi og á Viðskiftastovuni í Keypmannahavn í gjár kl 11 almannakunngjørdi landsstýrið samráðingaruppskotið í sambandi við samráðingarnar við donsku stjórnina

PRÆAMBEL

FÆRØERNE,
på den ene side, og

KONGERIGET DANMARK,

på den anden side,

I DET FØLGENDE benævnt DE HØJE KONTRAHERENDE PARTER;

SOM ERINDRER OM den historiske kendsgerning, at Færøernes Folk i alle tider har ret til at nyde ubegrænset selvstyre;

SOM ERKLÆRER at forbindelserne mellem dem er folkeretlige;

SOM BEKRÆFTER den betydning, de tillægger principperne om frihed, demokrati, markedsøkonomi, bæredygtig udvikling samt respekt for menneskerettigheder, de grundlæggende frihedsrettigheder, de sociale rettigheder og retsstatsprincippet;

SOM ER OVERBEVISTE OM at de har en fælles interesse i at oprette tætte og gensidigt gavnlige forbindelser inden for rammen af en associeret statsforbindelse;

SOM ER BESLUTTET PÅ at oprette en økonomisk overgangsordning, der tilstræber opbyggelsen af en selvbærende økonomi på Færøerne;

SOM HAR DET FORSÆT at oprette en administrativ overgangsordning, der tilsigter en selvstændig offentlig administration på Færøerne;

SOM ANERKENDER at Færøernes Folk i ubegrænset tid har sin suverænitet samt sin suveræne selvbestemmelsesret og den deraf følgende ret til at vedtage og ændre sin egen Forfatning samt form for regeringsmagt, og at Færøernes Folks godkendelse af at Færøerne indgår i denne traktat om associeret statsforbindelse, udgør en udøvelse af Færøernes Folks suveræne selvbestemmelsesret;

HAR VEDTAGET til virkeliggørelse af disse målsætninger og i betragtning af, at ingen bestemmelse i denne traktat kan fortolkes således, at De Høje Kontraherende Parter fritages for de forpligtelser, som påhviler dem ved andre traktater,

AT INDGÅ DENNE TRAKTAT:

**AFSNIT 1**

FÆLLES BESTEMMELSER

*Artikel 1*

1. Ved denne traktat opretter DE HØJE KONTRAHERENDE PARTER indbyrdes en ASSOCIERET STATSFORBINDELSE, i det følgende benævnt FÆLLESSKABET:

2. Denne traktat om associeret statsforbindelse, i det følgende benævnt TRAKTATEN, opretter Færøerne som en fri og suveræn stat.

3. Med henblik på at virkeliggøre de i stk. 1 og 2 omhandlede bestemmelser forpligter De Høje Kontraherende Parter sig ved denne traktats ikrafttrædelse at notificere samtlige suveræne stater samt De Forenede nationer, at De Høje Kontraherende Parter ved indgåelsen af denne traktat har vedtaget at Færøerne udgør en fri og suveræn stat.

4. De Høje Kontraherende Parter har tillige vedtaget, at Fællesskabet med henblik på at virkeliggøre de i stk. 1 og 2 omhandlede bestemmelser medfører i overensstemmelse med denne traktats bestemmelser en økonomisk overgangsordning, der tilstræber opbyggelsen af en selvbærende økonomi på Færøerne samt en administrativ overgangsordning, der tilsigter en selvstændig offentlig administration på Færøerne.

5. Den økonomiske overgangsordning samt den administrative overgangsordning er fastsatte i henholdsvis andet afsnit og tredje afsnit.

*Artikel 2*

1. I denne traktat forstås ved »traktat« hovedtraktaten med tilhørende protokoller og bilag.

2. Denne traktat er folkeretlig. I henhold hertil samt i henhold til artiken 102 i De Forenede Nationers Pagt notificerer Kongeriget Danmark De Forenede nationer om denne traktats folkeretlige status med henblik på registrering ved De Forende Nationers Sekretariat samt publikation. Denne traktat overbringes som bilag til den diplomatiske note.

Artikel 3. Fællesskabets institutionelle opbygning består af et kongefællesskab og et blandet udvalg.

3. Fællesskabets institutionelle opbygning er nærmere fastlagt i femte afsnit.

Artikel 4
De Høje Kontraherende Parter træffer alle almindelige eller særlige foranstaltninger til at sikre opfyldelsen af de forpligtelser, som følger af denne traktat. De afholder sig fra at træffe foranstaltninger, der vil kunne bringe virkeliggørelsen af denne traktats målsætninger i fare. De fremmer endvidere samarbejde inden for rammerne af denne traktat.

*Artikel 5*
Inden for denne traktats anvendelsesområde og med forbehold af dennes særlige bestemmelser er al forskelsbehandling af fysiske personer, der udøves på grundlag af nationalitet, forbudt.

*Artikel 6*
Intet i denne traktat er til hinder for, at Kongeriget Danmark opretholder sine retlige forpligtelser, som følger af acquis communautaire.

*Artikel 7*
En høj kontraherende part kan til enhver tid indbringe et spørgsmål for De Blandede udvalg i overensstemmelse med retningslinjerne i artikel 16, stk. 2.

**AFSNIT II**
BESTEMMELSER OM ØKONOMISK SAMARBEJDE